## Børn gjarna tatoverast

Donsk foreldur venda sær oftari og oftari til danskar tatovørar fyri at fáa børn síni tatoverað. Hetta hendir hóast ein skal vera 18 ár fyri at kunna tatovera ungdóm, skrivar Dagbladet Roskilde. - Tað er í roynd og veru ein so stórt trupulleiki, at vit tosaðu um tað á seinasta fundi okkara, sigur Johhny Hansen, sum hevur verið formaður í "Dansk Tatovørlaug" seinastu átta árini. Hann fær hvørja viku áheitan frá 5 til 10 foreldrum um tatovering. Foreldrini halda, at loyvi er at gera hetta arbeiðið, um tey geva loyvi til tess. Men so er ikki.



## Umsíðir kom nálin

Ein amerikonsk húsmóðir hevur funnið loysnina uppá væl kenda trupulleikan at draga tráðin uppá nálina. Eftir at sjón og motorikkur hjá Pam Turner viknaðu, setti hon sær fyri at loysa trupulleikin. Úrslitið gjørdist nálin sum kallast "spiraleyga-nálin" (sí mynd). - Vit hava sent fólk til mánan, men eingin hevur uppfunnið eina ordiliga nál, - ikki fyrrenn nú, sigur Pam Turner. Nálin kostar slakar 30 krónur.





*- Úrslitini av royndunum við toskaaling á Árnafirði er tað positivasta, eg havi upplivað, segði Arne G. Kolbeinshavn, verkætlanarleiðari hjá Fiskaaling í frágreiðing fyri hálvum triðja ári síðan*

# Heimsins vakrasti toskur í Árnafirði

**- Fyri mær, sum alt mítt lív havi fingist við at granska og menna toskaaling, er hetta tað positivasta, eg havi upplivað. Her er einki kanska, og her eru eingi fyrivarni. Úrslitini av royndunum við toskaaling á Árnafirði er tað positivasta, eg havi upplivað, segði Arne G. Kolbeinshavn, verkætlanarleiðari á Fiskaaling fyri hálvum triðja ári síðan**

TOSKAALING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í september mánaða í 2008 høvdu vit áhugaverda grein um toskaaling. Tá varð staðfest, at alitoskur av Árnafirði undan lívfiski á Føroya Banka er tann toskur, sum veksur skjótast í verðini.

Maðurin, sum kom til hesa niðurstøðu, var Arne G. Kolbeinshavn, verkætlanarleiðari á Fiskaaling við Áir og sum helst veit eina mest um toskaaling í Noregi.

Niðurstøðan hjá honum var eisini, at aldi toskurin á Árnafirði var flottasti toskur, hann nakrantíð hevði sæð.

Orðini hjá Arne G. Kolbeinshavn vóru við í eini fyribils frágreiðing um toskaalingina á Árnafirði, og her vísir verkætlanarleiðari eisini á, at vónirnar, hann hevði til toskaaling í Føroyum, hava hildið bæði væl og virðiliga.

- Fyri mær, sum alt mítt lív havi fingist við at granska og menna toskaaling, er hetta tað positivasta, eg havi upplivað. Her er einki kanska, og her eru eingi fyrivarni. Úrslitini av royndunum við toskaaling á Árnafirði er tað positivasta, eg havi upplivað. Skuldi tað hent, at svinnið eisini verður lítið í hesi royndini á Árnafirði, so er tað enn ein sólskinssøga í toskaalingini, sum eg ikki trúði, at eg fór at uppliva.

So positivur og bjartskygdur var Arne G. Kolbeinshavn í síni frágreiðing um hesa aling, sum nú fyribils er løgd á hillina, tí marknaðarprísirnir á aldum toski ikki vístu seg at halda.

Vit kunnu vísa til orðini hjá Regini Jacobsen um, at biologiskt eydnaðist royndin á Árnafirði væl, men við tí prísgrundarlagi, sum seinni vísti seg at koma, verður einki gjørt við toskaaling í Føroyum fyribils.

25-30 krónur fyri kilo.

- Eins og aðrir ráfiskaprísir, hevur toskur verið fyri so stórum prísfalli, men nú er kortini líkt til, at toskaprísurin er á veg uppeftir aftur.

Hann sigur, at prísurin, sum Bakkafrost fekk fyri toskin, sum tikin varð í fjør summar, var millum 12 og 15 krónur fyri kilo, kruvdur við høvdi.

- So, fyribils er toskaaling ikki við í okkara konsepti, men vit leggja okkara orku í laksaalingina, sigur stjórin í Bakkafrost, Regin Jacobsen.

*Mong vóru tey, sum mundu halda, at nú bíðaði okkum eitt rættiligt nýbrot og ævintýr í føroyskari alivinnu. Men so verður ikki – fyribils*